# Klokkurnar ringja fyri G!



*Myndir: Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað var frálíkt veður, stilli men kølið, tá fyrstu ungdómarnir møttu á G! mikudagin. Teir komu úr øllum ættum, og bíðirøðan uttanfyri tjaldingarplássið minti um ikki sørt um stór tiltøk úti í verð, har tað ræður um at vera fyrstur at fáa tey bestu plássini. Tað gjørdi eisini løtuna, tá myndamaðurin hjá Sosialinum var á staðnum klokkan 10 á kvøldi, ikki sørt hátíðarliga og eyka hugnaliga, tá klokkurnar í Gøtu kirkju bráddliga rungaðu um vøllin. Jú vist, hetta var góð og ljómandi byrjan uppá eitt sera spennandi tónleikatiltak, sum fer at standa ovast á breddanum komandi dagarnar.







